



*Jonna Joensen í armvermarum frá ArmCandyCulture*

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos

# Modell í New York

FØROYSKA **JONNA JOENSEN** BLEIV STEÐGAÐ Á GØTUNI Í **NEW YORK**, TÁ HON VAR Á **NÁMSFERÐ** VIÐ FLOKKINUM Í HEYST. EIN **SNIÐGEVI** VILDI NÝTA HANA SUM **MODELL** TIL **ARMVERMARAR**.

Jonna Joensen gongur á handilsskúla í Kambsdali, og á heysti 2009 var hon saman við flokkinum á námsferð í USA. Leiðin gekk til New York og Washington.

Tá hon gekk á gøtuni í New York varð hon steðgað av einari kvinnu, ið spurdi um hon vildi verða modell fyri hennara armvermarar.

– Hon var nýblivin sniðgevi og hevði áður skrivað handrit til filmar, greiðir Jonna frá.

Jonna trúði ikki rættuliga upp á kvinnuna, men eftir at hon kannaði heimasíðuna og hølið, har myndirnar skuldu takast, gjørdi hon av at taka av.

– Studio, har myndirnar vóru tiknar, lá á Manhattan og er sama studio, har myndirnar til »American Topmodel« verða tiknar. Colgate og L'Oreal nýta eisini sama studio, sigur Jonna.

Jonna var sminkað og gjørd í stand, og dagurin gjørdist eitt satt upplivilsi.

Nakra løn fekk hon ikki fyri ómakin, men hon fekk allar myndirnar.

Jonna hevur ikki fingist nakað serligt við at vera modell áður, men fyri stuttari tíð síðani hevur hon eisini tikið myndir til troyggjurnar hjá Navia.



*Jonna var á námsferð við flokkinum í New York*

## KLUMMAN



*Inna Törnroos*

# Gev mær ein ladara og ein ctrl+z knøtt

Telefonin, teldan og tannbustin - hesi trý ting góvu mær nakað at hugsa um nú ein dagin.

Tey vera øll trý brúkt nógv, og øll trý hava brúk fyri at blíva lødd við jøvnum millumbili.

Eg brúki tey nakrar tímar, og so geva tey eitt lítið ljóð, ið signalerar, at nú hava tey brúk fyri nýggjari orku.

Tey ávara nakrar ferðir, og takið eg tey ikki í álvara, so slokna tey. Slutt - finido - orkan er uppi!

Spurningurin er, um vit menniskju ikki eisini burdu verið inrættaði sum hesi el-tól. Tað hevði verið hent at havt ein vísara, ið vísir, hvussu stendur til við orkuni. Tá tað fer at lýsa reytt er bara at leggja seg á sofuna eina løtu til grøna ljósið bleiktrar aftur.

Nú koyra vit ofta til reyða ljósið lýsir, ávaringin hevur ljóðað, og ljósið er sloknað. Speedarin er í botn, og oftani steðga vit ikki, fyrrenn krasjið er verðuleiki, og vit verða noydd av likamligum og sálarligum grundum at steðga.

Onnur el-tól, ið eg mangan havi ynskt vóru menniskjalig, er ein ON/OFF knappur á børninum. Hugsa tær at bara seta á OFF tá, tey skulu sova, og so á ON tá tey skulu upp morgunin eftir. Genialt - útsvøvnd børn, ið vakna glað, og tá man sjálvur vil tað.

At trýsta Ctrl+z (angraknøtturin á telduni) hevði sjálvandi heldur ikki verið av lagi at havt í veruliga lívinum. Mangan gleppur okkurt um varrarnar, ið hevði verið betri at havt fyri seg sjálvan. Ein ctrl+z knøttur hevði loyst tann trupulleikan!

Og so ikki at gloyma ctrl+f (finnaknøtturin) - sum eg mangan sakni hann, tá lyklar, húgvur, lummabók, suttir og fjarstýringar skulu finnast heima.

Ein tann stuttligasta samanblandingin av tí elektroniska heiminum og tí veruliga er søgan um mannin, ið fór í kirkju og setti seg á aftasta bonk. Hann hevði spælt í so nógv Tetris heima, og meðan hann lýður á gudstænastuna byrjar hann at fylla rekkjurnar við kirkjufólki - tvey úr hasari rekkjuni og fimm úr hinari - so havi eg eina fulla rekkju...



**MYND:** TILVILDARLIG

## INNIHALD


4 SAMRØÐA: **SIRIKIT JACOBSEN**
7 TIPS: **MAMMUDAGURIN**
8 90 SEKUND: **MARIANN KLEIN IVANSDÓTTIR**
10 BAKGRUND: **FACEBOOK**
12 REPORTASJA: **SALTSILOIN Á DRELNESI**
14 TIL ARBEIÐIS: **FRÍÐHILD WINTHER**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 BAKGRUND: **DEMOKRATISKAR REMBINGAR Á KUBA**
18 SPYRST SO LIVST: **RIGMOR SVARAR**
19 MÍN BESTA UPPSKRIFT: **HEITUR RÆKJURÆTTUR**
23 TAÐ HENDUR: **KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR osfr.**
24 VIKUMYNDIN: **BESTA MYNDIN Í VIKUNI**


VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Inna Törnroos
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Sirikit Jacobsen / Mynd: Álvur Haraldsen